

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Boringar hjá Atlantic Petroleum útsettar

**Jógvan Hugo Gardar**

27.12.2014 - 23:11

Oljan.fo

Ófriðurin á oljumarknaðinum, við nógvari framleiðslu og lækkandi oljuprísi, rakar nú eisini føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum.

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, segði í samrøðu við Kringvarpið í kvølda at tríggjar leitiboringar, sum vóru á skránni í bretskum øki næsta ár, eru í fyrstu atløgu útsettar til 2016.

Atlantic Petroleum hevur samstundis avskrivað Føroyar sum leitiøki. Leitivirksemið hjá føroyska oljufelagnum minkar nú tríggjar fjórðingar. Virksemið verður nú serliga í bretskum og í norskum sjógvi.